## Tungt á hjá kinesarum

Í einari røðu fyri kinesiska tjóðartinginum bað Wen Jintao, forsætisráðharri, kinesiska fólkið fyrireika seg til, at 2009 verður eitt tungt ár orsakað av altjóða fíggjarkreppuni. Hann boðaði samstundis frá, at stjórnin hevur gjørt av at brúka 585 milliardir dollarar til at styrkja kinesiska búskapin. Hann segði seg vóna, at átakið fer at geva fleiri milliónir arbeiðspláss. Tað er ikki bara kinesarar, sum fáa ágóða av tiltakinum hjá stjórnini, tí betri kinesisk keypiorka hevur ávirkan í fleiri londum.



## Umhugsa tingingar við Iran

Amerikansk uttanríkisráðharrin sigur, at USA umhugsar at ráðføra seg við Iran um viðurskiftini í Afghanistan. Hillary Clinton fanst samstundis at Iran, tí landið leggur seg út í viðurskiftini í Miðeystri. Uttanríkisráðharrin segði, at Iran er ein álvarssom hóttan orsakað av landsins kjarnorkuverkætlan, og tí at landið sambært fleiri fíggjar yvirgang. Kortini er USA til reiðar at leita eftir málum, sum londini kunnu samstarva um, og har tað kann vera gagnligt. Eygleiðarar og diplomatar hava fyrr sagt, at USA fer at tosa við Iran um Afghanistan.

# Pernille Aalund bjóðar seg fram



*Leygarkvøldið klokkan 20 kunnu føroyingar uppliva Pernille Aalund á Hvonn. Hon er blaðstjóri, rithøvundur, fyrilestrahaldari og hevur sítt egna talkshow 'QTV' á Kanal 4*

*Mynd: Elona Sjögren, Kanal 4*

**Flogferðin var longu fingin í lag, sjeikurin hevði fyrireikað gongutúrar í fjøllunum og vikuskiftið var sett av til Føroya-ferðina. Tí sleppa føroyingar kortini at uppliva Pernille Aalund um vikuskiftið. Men hesaferð verður tað ókeypis og á Hvonn.**

UNDIRHALD
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Eg vildi ikki avlýsa túrin til Føroya, tí allar fyrireikingarnar vóru longu gjørdar, og eg havi glett meg at koma aftur til Føroyar. Tí setti eg meg í samband við hotellið og bjóðaði teimum at brúka meg til eitthvørt, tá eg kortini var har, sigur Pernille Aalund, sum føroyingar sostatt kortini sleppa at uppliva. Ikki á avlýsta Kvinnu-tiltakinum í Norðurlandahúsinum leygardagin, men á Hvonn leygarkvøldið kl. 20.

Vánalig undirtøka var orsøkin til, at blaðið Kvinna valdi at avlýsa tiltakið í Norðurlandahúsinum, sum skuldi vera allan leygardagin.

Sambært blaðstjóranum á Kvinnu, Annleyg Lamhauge, var fíggjarkreppan helst orsøkin til vánaligu undirtøkuna.

Atgongumerkið kostaði 1000 krónur, og tað hevur eftir øllum at døma verið ov dýrt fyri føroysku kvinnuna anno 2009.

Men fíggjarkreppan forðar ikki Pernille Aalund at halda fyrilestur á Hvonn, tí tað har verður onki atgongugjald.

- Pernille Aalund avgjørdi at koma til Føroyar, hóast tiltakið 7. marts varð av ongum. Tá hon so bjóðaði seg til at hava fyrilestur her á Hvonn leygarkvøldið, tóku vit sjálvandi av, sigur Jenny A. í Heiðunum, Conference & Event Manager á Hotel Tórshavn. Av tí sama fáa Pernille Aalund og sjeikur hennaran, Søren, besta kamarið á hotellinum alt vikuskiftið.

### Lívið, fult av møguleikum

Pernille Aalund fortelur fyri Sosialinum, at fyrilesturin verður nøkulunda sama upplegg, sum upprunaliga ætlað.

Um at finna eydnuna í lívinum og at taka við teimum avbjóðingum og møguleikum, sum hvønn dag standa okkum í boði, og sum vit kunnu velja at taka av, um vit tora.

- Tað verður eitt pep-talk um at vera opin fyri broytingum og avbjóðingum í gerandisdegnum, fyri á tann hátt at uppliva hesa góðu »wauw-kensluna«, sum eg rópi tað. Tí lívið fløskar seg ongantíð, sum vit høvdu ætlað, og tí verða vit altíð vónbrotin, um vit seta nøsina upp eftir onkrum ávísum, sigur Pernille Aalund.

Hon forklárar tað við, at vit helst vilja skriva okkara egnu søgu, og tí seta okkum upp til ímyndina av tí perfekta lívinum. Men samstundis verða vit blendað av forðingum og frustratiónunum, og vónbrotið verður fasti fylgissveinurin í lívinum.

- Men hvør sigur, at tað er eydnan hjá júst tær til dømis at fáa mann og børn og hús og bil. Um tú letur eyguni upp og letur lívssøguna skriva seg sjálva, so eru eisini nógv størri sannlíkindi fyri, at okkurt fer at eydnast – at tú upplivar veruliga eydnu, sigur Pernille Aalund, við sínum eyðkenda og lætta stíli.

### Heldur norður enn suður

Sjálv livir Pernille Aalund eitt, sum hon sjálv rópar tað, hektiskt Keypmannahavnarlív mitt í miðlaheiminum, har alt gongur við rúkandi ferð. Tí er hon eisini sera glað at koma til Føroyar at taka sær av løttum í nakrar dagar.

- Vit lenda tíðliga fríggjamorgunin og fara helst at leiga okkum ein bil longu á flogvøllinum. Og so ætla vit at taka tað róligt allan vegin til Havnar – steðga og ganga og njóta náttúruna saman, sigur Pernille Aalund, sum er sera hugtikin av norðara parti av heiminum.

- Eg ferðist nógv heldur norðureftir enn suðureftir. Tað er heilt vist. Mær dámar so ómetaliga væl opnu víddirnar, skiftandi veðurlagið, litirnar og stórslignu náttúruna í Føroyum, Íslandi og Grønlandi.

### Hvíla í sær sjálvum

Og so eru fólkini eisini nakað heilt serstakt, heldur Pernille Aalund. Minna á ein hátt um fólkini í Norður Jútlandi.

- Mítt lív er fyri ein stóran part ein ferð millum fólk, sum látast at vera nakað. Við coctails, pinnamati og stressi. Tí hevur tað eisini stóran týdning fyri meg, at koma saman við fólki, sum bara eru. Sum hvíla í sær sjálvum og ikki eru partur av einari tilgjørdari framsýning, har alt snýr seg um at hava rætta starvið og Gucci-taskuna, sigur Pernille Aalund, sum hevur vitjað í Føroyum tvær ferðir áður, báðar ferðir sum gestarøðari hjá Føroya Tele.

Um avlýsta tiltakið hjá Kvinna, hevur hon ikki so nógvar viðmerkingar.

- Tey hava mett, at tað var neyðugt at avlýsa, og tí hevur tað helst verið rætta avgerðin, sigur Pernille Aalund, sum bert einaferð áður hevur upplivað, at eitt tiltak, sum hon skuldi luttaka á, varð avlýst.

- Heldur avlýsa enn at bróta nakkan, staðfestir hon til endans.